## DAGSINS MEINING

# Á flog

Í hesum døgum verða hundraðtals ungfólk liðug við eina miðnamsútbúgving. Vit hava góðar miðnámskúlar í Føroyum og málið við útbúgivngarpolitikkinum má vera, at øll ung fáa eina miðnámsútbúgving av einum ella øðrum slag. Vit liva í eini tíð við nógvum broytingum. Okkara búskaparliga støði er enn sum áður fiskivinna. Men henda vinna gongur sum kunnugt upp og niður og, bundin sum hon er at sveiggjum í prísum og tilfeingi. Hetta merkir, at vit eiga at statsa alt meira uppa á menniskjansliga tilfeingið í landinum. Menniskjansliga tilfeingið - fólkið, ið her búleikast er hóast alt tað mest týðandi tilfeingi í landinum.

Undir slíkum umstøðum er tað innlýsandi, at vit eiga at statsa uppá útbúgving. Tey lond, sum leggja dent á útbúgving, gransking og menning, tey eru før fyri at takla allar tær monu broytingar og avbjóðigar, sum standast av altjóðagerð og búskaparligum sveiggjum. Búskaparligu avbjóðingarnar verða stórar í framtíðini. Vit fara at fáa harða kapping frá menningarlondunum, soleiðis sum vit longu nú kenna tað frá Kina og vit fara at fáa harða kapping frá nýggju ES londunum. Eingin veit í roynd og veru, hvussu alt hetta fer at ávirka búskpapin í framkomnum londum sum Føroyar og Ísland, ið bert hava eina høvuðsvinnu. Í Føroyum hava vit havt eina góða byrjan til eitt orðaskifti um hesi viðurskifti, men orðaskiftið tykist nú líkasum dottið burturaftur.

Er óvissan sostatt stór um búskaparligu árinini frá tí broyttu heimsstøðuni, so er tó eitt, sum øll eru samd um, og tað er, at útbúgving hevur týdning fyri eitt samfelag. Eitt vælútbugvið fólk er ein tann mest týðandi fortreytin fyri menning og fyri at kunna takla avbjóðingarnar frá altjóðagerðini. Tað er tí av størsta týdningi, at vit hava góðan skúlaskap. Øll, sum fara úr 9. ella 10. flokki fólkaskúlans eiga at fáa tilboð um eina teoretiska ella praktiska miðnámsútbúgving. Í hesum døgum verða nógvar pisur klaktar. Tær flestu fara fyrr ella seinni víðari til eina ella aðra stytti ella longri útbúgving. Pisurnar fara á flog, sum tikið verður til í pisurøðum. Vit ynskja øllum tillukku og vóna, at tær flestu pisurnar finna leiðina aftur hendan vegin til gleði og gagn fyri tær sjálvar og fyri tað samfelag, ið hevur tryggjað teimum eina góða útbúgving.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Summa summarum

**Heri Mohr**



Løgtingssamgongurnar 1998 - 2003 virkaðu eina og aleina við tí fyri eyga at kvetta okkara ríkisfelagsskap við Danmark. Á hvørjum geilarhorni varð prædikað um, hvussu blokkstuðulin úr ríkiskassanum var við til at forkoma tí føroyska búskapinum. Hann var beinleiðis orsøkin til, at Føroyar fóru rabundus 6. oktober 1992, og meylað er upp í rúgvu niður í okkum, at ríkiskassa-stuðulin í roynd og veru er ikki annað enn olmussa og táta, (hesi eru ikki míni orð), sum hava niðurbundið frælsið hjá okkum føroyingum í Føroyum, (heldur ikki hesi orð eru míni).

Vert er at varnast, at øsingin snýr seg um partin av almennum útreiðslum, sum í ríkisstuðlinum eru játtaðar sjúkum, avlamnum, gomlum, fólkaskúla og yrkisskúlum. Tá ið landsstýrið í 2002 tveitti 366 milliónir fyri borð, vórðu skúlaverkið og onnur almenn forsorg tikin úr blokkinum. Aftur at hesum hevur almennur føroyskur politikkur farnu árini verið merktur av tíðar- og pengakrevjandi projektum, sum hava lítið við handaligan og andaligan trivnað í Føroyum at gera.

Hesi seks turbulentu árini hava verið sálarliga og mentunarliga ørkymlandi fyri mong føroysk heim fyri ikki at tala um tey sjúku og gomlu, sum fara at líða undir politiskum avgerðum við svárum avleiðingum.

Nú landskassaroknskapurin 2003 fyriliggur alment, ber til at meta um, hvussu »olmussan og tátan« hjá fyrrverandi landsstýrismanninum við fíggjarmálum royndust, og um hendan »fátækrahjálp« úr ríkiskassanum varð »samanspard at nýta, um búskapurin verður fyri afturgongd«! Summa summarum: _ Samanspardur ríkisstuðul til gomul og sjúk skal verða okkara bjarging, tá ið ringar tíðir fara aftur at gera vart við seg í Føroyum! Álit er í okkum gomlu og teimum sjúku!

Undirritaði hevur í óteljandi lesarabrøvum víst á tey ósannindi, sum ávísir politikkarar fylla føroyingin við, serstakliga í sambandi við blokkin, og eingin hevur enn víst tí aftur. Tann, ið tigur, samtykkir, verður ofta sagt.

Nú mátti verið nóg mikið við tragikomiskum sjónleikum, eitt nú leikinum í Keypmannahavn herfyri, sum fyri tað kundi verið tikin úr kendu skaldsøguni eftir Cervantes um láturverda harramannin Don Quijote og matglaða gekkin Sancho Panza úr la Mancha í Spaniu. Teir bardust við vindmyllur, geita- og seyðafylgi og annan ástýriligan ørvitisskap. Nú, 500 ár seinri, eru teir eins og Holgar Danski farnir at halda til í kjallarum í gomlum donskum slottum. Har eru, júst sum í ævintýrinum hjá H. C. Andersen, kistur fullar av gulli - men nú í tátulíki.

Slíkt má sjálvandi ikki forða landsstýrinum í skjótast gjørligt at virka fyri dagføring av tí í blokkinum, sum er ætlað statssjúkrahúsinum í Havn og Ríkishospitalinum, ið bæði tvey eru 100% donsk málsøki. Hetta eigur at verða gjørt, áðrenn umstøðurnar hjá sálarsjúkum í Føroyum koma heimspressuni fyri oyruni sum í Russlandi og Rumeniu fyri einum 10 árum síðan. Henda dagføring kann uttan iva verða framd, um landsstýrið vil semjast um hetta, og um góður fólkasiður og virðing fyri fólki verður støðið undir neyðugum tingingum partanna millum. Smoyggið upp um armarnar, nógv er at byggja uppaftur.

Samandráttur av landskassans roknskapum 1998-2003:

**Inntøkur:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Skattur og avgjøld ……… | 16.012 | mió. | |
| Ríkisstuðul ……………… | 5.994 | " | |
| Nationalbankin ………… | 146 | " | **22.152 mió.** |

**Útreiðslur:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Rakstrarútreiðslur …… | 16.552 | " | |
| Løgur (Íløgur?) ………… | 1.102 | " | |
| Rentur ………………… | 881 | " | **18.535 "** |
| **Avlop** ………………………… | | | **3.617 "** |

Viðvíkjandi ríkisstuðulinum er at siga, at av teimum 5.994 mió. eru 900 mió., sum ríkiskassin eftirgav (strikaði) av ríkislánum í 1998.

**Landsbankin:**

| | | |
|---|---|---|
| Innistandandi 31.12.97 | 954 | mió. |
| " 31.12.03 | 1.820 | " |

**Aðrir peningastovnar**

| | | |
|---|---|---|
| Innistandandi 31.12.97 | 88 | " |
| " 31.12.03 | 440 | " |

**Lán**

| | | |
|---|---|---|
| Skuld 31.12.97 | 6.549 | " |
| " 31.12.03 | 3.806 | " |

Øll uttanlandsskuld til fleiri lond, umleið 4.6 milliardir, (ca. 8% p.a.) varð í 1998 umskipað til ríkiskassalán (5% p.a.), og av hesum er ein hálv milliard rentu- og avdráttarfrí.

Í 2003 tók landskassin fylgjandi 3 brævalán, tilsamans 1.500 milliónir, til umskipan og afturgjalding av lánum:

| | | | |
|---|---|---|---|
| "2003-04" | 750.000 | mió. | (2% p.a.) |
| "2003-06" | 375.000 | " | (3,5% p.a.) |
| "2003-08" | 375.000 | " | (4,25% p.a.) |

Hetta vóru so nøkur (áhugaverd) tøl, tikin úr almennu landskassaroknskapunum 1998-2003.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Rúna Sivertsen runa@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen hans@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Toskastovnurin undir Føroyum

**Kári P. Højgaard**
*løgtingsmaður*



Nú styttist tíðin, til Løgtingið skal áseta fiskidagarnar fyri komandi ár, og sum vanligt eru vinnan og fiskifrøðingar ósamdir um støðuna og tilmælini liggja langt frá hvørjum øðrum.

Petur Steingrund frá fiskirannsóknarstovuni hevur rættuliga avgjørdar meiningar útfrá síni vitan um, at toskurin kann goymast í havinum, men ikki føðin. Hetta kom fram í útvarpsorðaskifti millum Petur Steingrund og Jón Kristjánson (sum eg tíverri bert hoyrdi partar av), men sum hann eisini førir fram í lesarabrævi í bløðunum. Hann verður stuðlaður av skyldmanninum Dánjal P. Højgaard, sum fekk stóran skelk av at hoyra kjakháttin hjá íslendska fiskifrøðinginum í áðurnevnda útvarpsorðaskifti.

Sum politikkari verður ein líka skelkaður hvørt ár, tá ein sær árligu tilráðingarnar frá ICES og Fiskirannsóknarstovuni.

Um toskin á landgrunninum verður sagt. *Stovnurin hevur verið væl fyri í fleiri ár, men er nú í skjótari minking. Veiðitrýstið er alt ov stórt. Við verandi veiðitrýsti er stórur vandi fyri, at stovnurin í 2006 kemur niður á sama støði sum í kreppuárunum fyrst í níti-árunum. Um stovnurin skal koma fyri seg upp á eitt ár. Má øll beinleiðis toskaveiða halda uppat. Skal hetta gerast yvir fleiri ár, eigur ein ætlan at gerast, har veiðitrýstið líðandi verður minkað um 2/3 í mun til verandi veiðitrýst.*

Tað er trupult at skilja at hóast støðan hjá einum fiskastovni verður søgd at vera heilt góð, verður tilmælt ein minking í veiðuni, tí sagt verður, at veiðitrýstið er ov stórt.

Niðanfyri er ein talva fyri tosk, men sama er galdandi fyri hýsu og upsa.

**Metingar, tilráðingar og veiða í tonsum fyri økið við Føroyar.**

| Ár | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 |
|---|---|---|---|---|
| **Toskur** | | | | |
| Gýtingarstovnur | 40.000 | 46.000 | 53.000 | |
| Tilráðing | 16.000 | 16.000 | 14.000 | |
| Veiða | 21.000 | 27.000 | 36.000 | 37.000 |

Tíverri eru bert veiðitølini fyri 2003.

DPH vísir í lesarabrævi sínum til kanningar hjá PS gjøgnum fleiri ár av túsundtals toskamagum sum vísa, at fiskurin inni á sjónum livir av nebbasild og skeljafiski, meðan størri toskurin úti á landgrunninum livir av svartkjafti og hvítingsbróður.

Var seinastu viku við trolbáti á landleiðini vestan fyri og royndu vit á umleið 60 favna dýpi. Toskurin sum fingin var, stóð til at bresta av hvítingsbróður umframt onkur hendinga skel var í maganum. Sama hevur verið galdandi onnur ár, so hetta er eisini føðin hjá toski innari á sjónum ávísar tíðir saman við nebbasild og yngul av ymiskum slag, eitt nú hýsu o. ø..

Tað er av avgerandi týdningi, at alt ið veitt verður, kemur til høldar og verður skrásett. Tí eru økisfriðingarnar saman við fiskidagaskipan okkara tann frægasta, og hava aðrar fiskivinnutjóðir fingið eyguni upp fyri hesi.

Vit skulu troyta fiskastovnarnar skynsamuliga, men tað er fulkomuliga burturvið at tosa um at stovnar eru væl fyri, fyri síðan at mæla til skerjingar í veiðuni við 25% til 66%. Har eri eg samdur við formanninum í Vinnunevndini, at skulu slíkar skerjingar fremjast, er bert spurningurin hvør sløkkir ljósið, tí tá er lívsgrundarlagið fyri fiskivinnuni burtur.

Tað ber heldur ikki til at samanlíkna fiskiskap við seyðahald. Tú veit altíð á leið hvussu nógvur seyður er í haganum og hevur hesin nærum alt grasið einsamallur. Í havinum eru alskyns verur sum liva hvør av aðrari, og tíbetur hevur ríkidømi verið størri, enn frøðingar hava mett. Fyrst í níti-árunum var fiskaloysi styttri tíðarskeið og tá var tilráðingin, at stovnurin var so illa fyri, at í nógv ár fram mátti ikki fiskast meir av toski enn 6000 tons árliga. Var hendan tilráðing fylgd hevði verið trupult at verið fiskimaður í Føroyum og hvør trygd er fyri, at stovnurin hevði verið betur fyri ídag?

Hvar var toskurin og hvussu kundi stovnurin koma so skjótt fyri seg hóast fiska var fleirfalt tilmæli?

Hvussu kundu menn meta so skeivt?

Náttúran, veður, vindur, hiti, gróður og streymur, alt hevur stóra ávirkan hvussu nógv kemur undan og fiskiárini hava altíð verið ójøvn og fara framhaldandi at verða tað.

Hjalti í Jákupstovu, Petur Steingrund, Jón Kristjánsson o. a. gera síni tilmæli eftir bestu sannføring og við tí serkunnleika teir hava, sama er eisini galdandi fyri Fiskidaganevndina, sum hevur eina stóra praktiska vitan og útfrá hesi vitan skal Løgtingið taka støðu. Sjálvsagt ger tað mun, um fiskað verður av einum stovni, men spurningurin er, um = kann setast við tað sum fiskað verður, ella onki verður tikið úr stovninum, tvs stovnurin hevði verið tað størri.

Fyri fáum árum síðani var lítil ella ongin roynd eftir goggu. Nú verður rættuliga stór orka løgd í hesa veiðu, og er henda ídag týðandi %partur av agninum hjá húkaflotanum. Tá bóru menn ótta fyri, at hesin veiðihátturin við rúsum gjørdar av plastdunkum fór at avoyða stovnin, men mær vitandi er veiðan eins góð nú og tá byrja var, so nógv talar fyri at har streymasjógvur er, kann rættuliga stór veiða fara fram uttan at hetta nervar stovnin.

Vit áttu í størri mun at fingið eitt felags stev í tilmælunum til burðardygga veiðu.

# Hattin av fyri Mikkjali!

**At SvF fer at samsenda við DR er eitt sera skilagott tiltak og er bert at síggja veruleikan í eyguni, at eitt føroyskt sjónvarp kostar nógvar ferðir tað, SvF kann vinna við hyggjaragjøldum og gekkaspølum**



**Johan Petersen**

Sjónvarpsstjórin Mikkjal Helmsdal hevur avgjørt, at tá ið vetrarskráin byrjar 1. oktober, fer SvF at samsenda stóran part av degnum við DR 1. Føroyskar sendingar verða sendar í bestu senditíðini millum kl. 18 og 21 og annars verður koplað yvir á DR 1.

**Skilagóð avgerð**
Hetta er ein sera skilagóð avgerð, tí so kann fíggjarorkan hjá sjónvarpinum brúkast burturav til føroyskar sendingar, og vit hyggjarar kunnu fáa eina góða sjónvarpsrás at síggja, tá ið tann føroyska ikki røkkur longur.

**Kostar fleirfalt**
Dreymurin um eitt føroyskt sjónvarp gerst ikki veruleiki við tí fíggjarorku, hyggjaragjøld og gekkaspøl geva - og so lang ífrá. Skulu vit hava eitt veruligt føroyskt tjóðarsjónvarp, so skulu politikararnir tríva djúpt, ja ógvuliga djúpt í sínar lummar, tí veruligt føroyskt sjónvarp kostar fleirfalt ta fíggjarorku, sum SvF ræður yvir.

**Ikki meiri føroyskt við nøkrum ð´um niðast á breddanum**
Ein kovboyfilmur gerst ikki meiri føroyskur, um nøkur ð standa niðast á breddanum - nei latið danir um at teksta filmir (skilja vit øll ikki danskt?) og brúkið fíggjarorkuna til veruligt føroyskt tilfar.

**Sjónvarpsstjórin konstaterað fakta**
So sjónvarpsstjórin hevur bert konstaterað fakta og roynir at fáa tað besta burtur úr, bæði fyri SvF og hyggjaran - og so kunnu politikarar rópa so galið teir vilja upp um, at teir eru skelkaðir, at SvF provokerar og at vit heldur skuldu havt svartan skerm!

**Uppskotið verið frammi áður**
Havi sjálvur fyri 8 árum síðan skotið júst somu loysn upp fyri táverandi politiskt valdu sjónvarpsnevndini, sum eg sat sum formaður fyri árini 95-98, men meirilutin hevði júst somu støðu, sum politikararnir í dag - heldur svartan skerm!

**Danofobi?**
Loysnin hjá sjónvarpsstjóranum sparir nógvum hyggjarum fyri lisensgjaldi til DR, sum kostar uml. 2.000 kr. árliga og so fáa vit bæði TV-avísina kl. 17.30 og danskar sendingar beinleiðis, ístaðin fyri ein ella fleiri tímar seinni. Hvat er galið við tí, Jógvan á Lakjuni, Andrias Petersen og Annita á Fríðriksmørk? Danofobi?

# Hattin av fyri SvF

**Jóanes N. Dalsgaard**
*jnd@kallnet.fo*



Eg hevði einaferð ein annars stak góðan arbeiðsgevara, sum hevði ein keðiligan vana. Tá okkurt var, sum skuldi gerast, so fekst tú ongantíð greitt at vita, hvat hann ætlaði. »Ger sum tú heldur vera best« plagdi hann at siga. Tá eg so eftir bestu sannføring hevði roynt at loysa uppgávuna, og hann kom at skoða verkið, so gretti tað ikki at orðini fullu: »Tað var ikki akkurát soleiðis, eg hevði ætlað tað«.

Hetta rann fram fyri meg, nú tingmenn og onnur eru á gosi, tí SvF hevur ætlanir um bert at senda føroyskt sjónvarp primetime frá kl. 18 til kl. 21, meðan DR1 verður sent frá kl. 12 til kl 18 og frá kl. 21 og úteftir. »Grov provokatión« sigur formaðurin í mentanarnevnd løgtingsins. »Sløkk kl. 21« sigur fyrrverandi mentamálaráðharri. »Illa við« sigur núverandi mentamálaráðharrin.

Hvat er tað sum er hent? Hvør er søgan? Jú søgan er tann, at politiski myndugleikin hevur ongantíð gjørt sær greitt, hvat hann vil við føroyskum sjónvarpi. Orsøkin til at vit í dag hava føroyskt sjónvarp er, at tað í SvF starvast nakrar eldsálir, sum royna at skapa eina meining við sínum starvsliga gerandisdegi. 'Arbeiðsgevarin', sum í seinasta enda er løgtingið, hevur ikki dugað/ kunnað/ viljað tikið støðu til, hvussu føroyska sjónvarpsuppgávan skal loysast. Besta prógv um hetta er, at eingin sum helst samanhangur er ímillum játtanina til SvF og so tað, sum løgtingsfólk vænta/krevja av stovninum. Tá so leiðslan í SvF roynir at fáa tað besta burturúr, so er alt á gosi: "»Tað var ikki soleiðis vit ætlaðu« ljóðar frá løgtinginum í summarfrí.

Men hvat ætlar løgtingið við SvF? Og hví kann løgtingið ikki tryggja SvF fíggjarligar karmar, sum svara til tað, sum kravt verður av stovninum?

Meðan hesir spurningar hanga ósvaraðir í luftini, fari eg at heilsa ætlanunum hjá SvF-leiðsluni vælkomnum. Ikki tí, sjálvandi hevði tað allarbesta verið, um vit kundu sæð føroyskt og føroyskað tilfar á SvF alt samdøgrið. Men tað eru umstøðurnar ikki til. Tí taki eg hattin av fyri SvF-leiðsluni, at hon hevur dirvi til at taka eina so kontroversiella avgerð. Eg haldi heilt vist, at avgerðin er røtt, soleiðis sum umstøðurnar eru.

Tað er gott, at onkur dugir at taka eina avgerð!